Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jenis Kristian av Rana, løgtingsmaður

Svarari: Aksel V. Johannesen, løgmaður

Evni: Lóggáva um trúarsamfeløg

Spurningur:

1. Fer landsstýrið at seta í verk lóggávu um trúarsamfeløg í Føroyum – og um so er nær?

Viðmerkingar:
Í svari til § 52a fyrispurning frá undirritaða hin 16. januar 2026, nevndur "Fremmand trúarsúmbol í Føroyum" (52-063/2025), svarar Sirið Stenberg, landsstýriskvinna, m.a., at: "Hinvegin er lóggáva um trúarsamfeløg í øðrum londum, og vert er at viðgera, um tørvur er á slíkari lóggávu í Føroyum." Við hesum er tað ikki greitt, hvørt landsstýriskvinnan hevur ætlanir um at seta slíka lóggávu í verk ella ikki.

Hesin fyrispurningurin verður tí settur fyri at fáa greiðu á, um talan bert er um hugsanir hjá landsstýriskvinnuni, ella um landsstýrið fer at koma í Løgtingið við uppskoti um lóggávu um trúarsamfeløg í Føroyum – og um so er, nær hetta kann hugsast at fara at verða gjørt.

Í svari sínum greinaði landsstýriskvinnan annars støðuna soleiðis:

- at avmarkingar ella forðingar í vard mannarættindi ber bert til at seta við greiðari lógarheimild
- at tær mugu verða grundaðar á atlit at tungtvigandi og samfelagsliga viðurkendum endamálum, so sum almennu trygdina, friðin, heilsuna ella virðingina fyri rættindunum hjá øðrum
- at inntriv skulu harumframt vera neyðug og proportional í mun til endamálið
- at serliga tungtvigandi grundir skulu til, um beinleiðis inntriv skulu verða vend móti einum ávísum trúarsamfelagi ella átrúnaði
- at í rættarvenju hjá Mannarættindadómstólinum í Strasbourg eru fleiri dømi um, at slík inntriv eru góðtikin, tá ið eitt nú almenn trygdar- og skipanaratlit ganga framum átrúnaðarlig atlit hjá borgarunum, t.d. í ferðslu-, byggi- og býarskipanarmálum
- at hesi koma undir undantaksregluna til vard politisk og borgarlig mannarættindi

Nevnast skal, at av serliga tungtvigandi grundum til ikki at loyva moskubygging í Føroyum verða annars millum manna javnan nevndar:

- royndir úr m.ø. grannalondum
- atlit til almenna friðin og samhaldsfestið í einum lítlum samfelagi
- forðing av paralellsamfeløgum
- vernd av føroyskari mentan, virðum og fólkaræði

Á Løgtingi, 21. januar 2026

Jenis Kristian av Rana